## Tvær verkætlanir skulu venda gongdini



*Støðan í Svínoy er ikki góð, men hetta hevur tó ikki tikið mótið frá fólk um eina verkætlan í sambandi við ferðavinnuna*

**Svínoy:** Fólkatalið minkar støðugt og arbeiðsplássini fækka.

Hetta er støðan í Svínoy, soleiðis sum hon verður lýst í Glóðini, blaðnum hjá útoyggjunum.

Hóast hesar veruleikar, so eru tað kortini tey, ið ikki hava mist allar vónir fyri eini framtíð á hesi oynni. Tvær verkætlanir eru nevniliga á veg.

Í fyrra førinum er talan um ta gomlu og nógv eftirspurdu ætlanina um prosjektering av tunli og ferjuhavn. Og í seinna førinum er ein ætlan í umbúna um bygging av einum ferðavinnudepli.

Verða hesar ætlanirnar til veruleika, og batna umstøðurnar annars í oynni, so er ikki óhugsandi at ungfólk hava áhuga í at flyta aftur til oynna at búgva, skrivar blaðið.

**sb.**

## Seinastu tyrlupallurin skal dagførast



*Umframt ferðasambandið við Másanum hava fugloyingar eisini møguleika at fara av oynni við tyrlu. Nú skal tyrlupallurin á Kirkju dagførast so hann lýkur allar treytir fyri hesi flúgvingini*

*Mynd: Landsverk*

**Fugloy:** Ov tíðliga er at siga nakað um tíðarætlanina, men neyðugt er í øllum førum at dagføra tyrlupallin á Kirkju.

Talan er um eitt arbeiðið, sum er liður í eini dagføring av tyrlupallunum í landinum.

Hetta er eitt krav frá Statens Luftfartsvæsen (SLV), og tá hetta arbeiðið er liðugt, lúka allir tyrlupallar í Føroyum tær ásettu treytirnar.

Sum støðan er í dag, er sjálv prosjekteringin liðug. Keyp av lendi til hesa verkætlan er kortini ikki fingið uppá pláss.

Hinvegin so er prosjektgóðkenning fingin frá SLV, eins og játtan frá friðingarmyndugleikanum og byggiloyvi til verkætlanina.

Av Landsverki verður upplýst, at henda verkætlanin fer at kosta um 2 mió. kr.

**sb**

Jan Mortensen, Vinnuhúsið:

# – Vinnumálaráðið lovar bata

**Vinnuhúsið hevur vegna gistingarhús- og matstovufelagið, sum heldur til í húsinum, í drúgva tíð ført fram fyri Vinnumálaráðnum, at handilsligu treytirnar, sum matstovur og gistingarhús fáa í Rúsuni, eru burturvið. Men nú er ein glotti at hóma fyri framman**

MATSTOVUVIRKSEMI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, sigur, at hann hevur fingið at vita í Vinnumálaráðnum, at ein kunngerð, sum fer at heimila Rúsuni at geva til dømis matstovum avsláttur, væntandi verður lýst í komandi mánað*

*savnsmynd*

Í farnu viku gramdu nakrir matstovustjórar seg her í blaðnum um handilsligu treytirnar, ið teir fáa í Rúsuni, tá ið teir keypa vín og brennivín. Stjórin í Vinnuhúsinum, Jan Mortensen, er samdur í atfinningunum, men hann sigur eisini, at Vinnumálaráðið hevur lovað bata í hesum sambandi.

### Fáa heimild at geva avsláttur

Jan Mortensen sigur, at síðst í oktobur mánað í fjør fekk Vinnuhúsið eitt uppskot um nýggja kunngerð fyri Rúsdrekkasøluna til hoyringar, sum millum annað loyvdi Rúsuni at veita matstovum og gistingarhúsum at keypa upp á borg og at fáa mongdaravsláttur.

– Vit tóku undir við nýggju kunngerðini og sendu beinan vegin Vinnumálaráðnum aftur. Vit hava roynt at fingið svar upp á, hvar málið liggur, og eg havi júst nú verið í Vinnumálaráðnum og spurt meg fyri. Har siga tey, at kunngerðirnar væntandi verða lýstar í komandi tingsetu. Tað merkir, at hetta væntandi kemur í gildi í komandi mánað, sigur Jan Mortensen.

Stjórin í Vinnuhúsinum sigur, at alla aðrastaðnis er tað vanligt, at størri kundar so sum matstovur og gistingarhús fáa vín og brennivín til heilsøluprís, men soleiðis er ikki í Føroyum. Hann heldur tí, at tað er upp á sítt pláss, at hesin trupulleiki verður loystur nú, soleiðis at matstovurnar fáa betri kor at virka undir. Eins og fleiri onnur hava ført fram í miðlunum, so heldur Jan Mortensen tað verða ein trupulleiki fyri Rúsdrekkasølu Landsins, at stovnurin hevur fingið álagt at hava eitt ávíst yvirskot av landsmyndugleikunum, tí tað merkir, at prísirnir noyðast at verða á einum ávísum støði.

# Fáir skaðar í Havn




*Menn frá sløkkiliðnum taka eitt skelti niður, sum kundi farið í vindinum. Betri er at vera fyrivarin enn eftirsnarin*

*Mynd: Alf Haraldsen*

**Sløkkiliðið í Havn var úti nakrar ferðir í nátt, men annars var ikki talan um nakra skaðanátt**

ÓDNARVEÐUR
*Snorri Brend*

**Havn:** Tað vóru mest smávegis skaðar í tí nógva vindinum í nátt.

Menn frá sløkkiliðnum vóru úti fleiri ferðir, tí ymiskt lá leyst í vindinum. Men talan var ikki um teir stóru skaðarnar, sum óttast var fyri.

Fráboðanirnar í Havn vóru ymiskar:

Ein brotin rútur, vatn í einum kjallara, ein leys parabol, eitt leyst stakitt og ein leysur bátur, - bara fyri at nevna nakað.

Annars var ikki talan um nakrar ógvusligar tilburðir.